# NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundir føðingardagar, brúðleypsdagar, starvssetanir og -dagar.

## Ein heilsan til Henry Jarnskor á 70 ára føðingardegnum tann 6. august

Oh Henry, Oh Henry, Tillukku í dag,
Tú sjeyti ár ert og í fagrasta lag.
Vit ynskja tær alt gott og frøðast við tær,
At fagnast av teimun ið tú hevur kær.

Oh Henry, Oh Henry, tey árini mong,
Tað sær bert so út, sum at tíðin er long,
So ungur í sinni, og léttur á fót,
Úr Gøtu væl útborðin, har var tín rót.

Oh Henry, Oh Henry, tey ungdómsins ár,
Tá tú fórst til skips, enn tað er sum í gjár.
Og mong ár tú sigldi so víða um høv,
langvegis um havið og strendur og nøv.

Oh Henry, Oh Henry, nógv minnist væl til,
Tá ætlan tú skifti og keypti tær bil,
Nú hevur busskoyring tú haft langa tíð,
Við tær mangur koyrdi um dalar og líð.

Oh Henry, Oh Henry, tær dámar so væl
Á fótbóltsdyst ganga og síggja gott spæl.
Tú fylgir við landsliðinum hvar enn tað fer,
Um heima teir spæla, um útið í verð.

Oh Henry, Oh Henry, á Naina var gott
Vælkomin frá fyrst av vit komu á gátt.
Við sangi og tónleiki tíðin hon rann,
Og skjótt gingu dagarnir, tað sannast kann.

Oh Henry, Oh Henry, tú takk hava skal
Fyri løturnar góðar, tað var ei so væl,
Á høkjum eitt fylgi, vit haltaðu øll,
Men látur og skemt hoyrdist víða um vøll.

Oh Henry, Oh Henry, tú bragdligast gekk,
og okkum so skjótt út at ganga tú fekk,
Ein túr í plantasjuna, tað gjørdi gott,
Har eingin seg keddi, og tíðin gekk skjótt.

Og Henry, Oh Henry, vit gloyma ei teg,
Og ynskja at Harrin tær fylgja á veg,
Fyri teg og øll tíni, vit ynskja alt gott.
Guðs signing má verða á degi og nátt.

**K.V.A.**

## Vinur fyllur sjeyti



Í dag, mikudagin 6. august, fyllur Henry Jarnskor, ættaður úr Norðragøtu, búsitandi á Strondum, sjeyti.

Henry er giftur við Johannu, tey eiga 4 børn og fleiri abba- og ommubørn.

Henry fór sum 15 ára gamal, í 1949, sín fyrsta túr til skips, við togaranum Trónda í Götu og sigldi við Tróndi í Götu í nøkur ár. Fór so til Íslands at sigla við togarum og øðrum skipum. Árini 1954-55-56 og 58 sigldi eisini við ymiskum skipum sum maskinmaður.

Men tað sum Henry man verða best kendur fyri, er uttan iva sum busseigari og ítróttarvinur.

Henry hevur í mong ár verið formaður í StÍF, har legði hann eitt stórt arbeiðið í felagið sum formaður. Hann sá, at tað varð neyðugt at byrja við teimum ungu. Tað er eisini millum annað honum og øðrum góðum kreftum fyri at takka, at fyrsta mannslið hjá StÍF gjørdist føroyameistari nú í ár og hevur verið millum tey fremstu í fyrstu deild tey seinnu árini, nú verður tað heystað, sum stungið varð út í kortið fyri 15-20 árum síðan.

Ítróttarfeløg skullu brúka nógvan pening, og har var Henry ein primusmotor við góðum raðfestingum, og røttum avgerðum, men tað gekk.

Fyri nøkrum fáum árum síðan takkaði Henry fyri seg, men er enn til dystin fús, tá ið tað ræður um stuðul av ymiskum slag, tað verið seg í høll ella aðrar staðir.

Tá ið vit nevna navnið Jarnskor, so seta vit tað í samband við GÍ, eisini her hevur Henry stuðlað á sín hátt og verið dyggur viðhaldsmaður hjá GÍ.

Henry er farbróður at øllum Jarnskorunum, sum hava verið við til at manna GÍ liðið upp til henda dag og hava sett sín dám á 1. deild í fótbolti hjá monnum, frá áttati- og nítiárunum, enn er onkur eftir á 1. liðnum.

GÍ hevur havt tann eginleika, og tað sama kann sigast um Henry, at einki er avgjørt, fyrr enn leikur er lokin, tað seiggi ið skal til og viljin til at vinna.

Tá ið Bygdaleiðir varð sett á stovn, seinast í sjeyti-árunum, við fyrst leið 100 og 101 og nakað seinni víðkað við fleiri leiðum, vóru eisini boð eftir Henry Jarnskor, og fekk hann nýggja buss sín í litunum hjá Bygdaleiðum í dec. 1985, í tí góða gamla litinum, hann koyrdi við øðrum bussi í byrjanni.

Henry, saman við fleiri øðrum, løgdu doyðin á at alt skuldi koyra, og eitt orð var eitt orð, ein maður ein maður. Teir flestu av samstarvsmonnum hansara eru nú givnir at koyra.

Henry hevur koyrt sítt virki í eitt Sp/F, og í dag gevst hann at koyra, og yngri ættarlið tekur yvir.

Tá ið Busssamtøkan varð stovnað, gjørdist Henry fyrsti formaður, hann hevði avgørt sínar meiningar, men varð góður at samstarva við og reiðiligur maður, men vildi at hvør maður skuldi hava sítt, og tað sum hann átti.

Eisini arbeiddi hann eitt skifti á Farstøðini í Havn, var góður í ráðum og góður at samstarva við.

Hansara gløgni var stundum við til at loysa truplar uppgávur, so at trafikkurin gleið smidliga. Hann var trúfastur í allar mátar.

Henry hevur verið trúgvur stuðul hjá Javnaðarflokkinum. Hann hevur eisini verið uppstillaður til løgtingsval og havt onnur álitisstørv hjá flokkinum.

Eisini hevur hann sett fram sínar, ofta beinraknu og persónligu meiningar á skrift, og hevur hann havt dyrvi til at tala "Roma mitt ímot", og víst á aðrar gongdar leiðir. Hann hevur lagt doyðin á, at øll skulu liva í Føroyum og ikki bara nøkur útvald, sama um tú ert lágur ella høgur.

Henry er valdur í friðingarnevndina fyri Eysturoyar Sýslu, og hevur hann eisini verið við til at taka stórar avgerðir, sum hava hildið.

Á ungum árum fór Henry á bíbliuskúla í Danmark, og hevur hann fleiri hollar og trúfestar vinir frá teirri tíðini, sum hann samskiftir við enn.

Í sjeytiárunum varð Henry valdur í kirkjuráðið í Sjóar sókn og sat har nøkur ár.

Sum gamal sjómaður hevur Henry eisini tokka til Føroysku Sjómansmissiónina: Hann hevur verið í Íslandi og gjørt ymiskt viðlíkahaldsarbeið á Ørkini í Reykjavík, um høvið býðst er hann fúsur at fara avstað aftur, tí hann er fittur í hondunum, dugur væl við einum lykli ella øðrum í hond.

Eisini hevur hann havt møti á Ørkini, havt vitnisburðir á sama stað, hevur framborðið orðið á ein einfaldan lættfatandi hátt.

Tað er í trongdum, ein skal læra sínar vinir at kenna, serliga tá ein gongur í mótbrekku og hevur verið fyri happi.

Hvar eru allir triðingsvinirnir, tá ein hevur brúk fyri teimum - burtur, tí teir vóru eingir vinir, men so er Henry ikki, hann hevur ongantíð gloymt ein, hevur trúliga ringt, og við sínum lætta og skemtingarsama sinni gjørt hvønndagin ljósari.

Havi mangan sitið gott í heiminum hjá tykkum og notið tykkara gestablídni.

Mín góði vinur Henry, hjartaliga tillukku á sjeyti ára degnum, Harrin styrki teg og tíni, og gevi tær eitt langt og gott lívskvøld. Tillukku enn einaferð.

**Heilsan ein vinur**

## Dagurin

**6. august. Kristi dýrd.** Dagurin verður hildin til minnis um Jesu umbroyting á fjallinum (Matt. 17, 1-9).

## Minningarorð um Zacharias Olsen

Við Sakarisi er ein bygdarmynd í Fuglafirði farin. Sakaris hevði fragd í at vera ógvusligur í orði og talu, og tað ganga nógvar skemtisøgur millum fuglfirðingar um hetta; men aftan fyri hesa útsíðuna búði eitt heitt og arligt hjarta.

Hann var bráður av lyndi, og var okkurt, so segði hann sína meining bart út uttan at taka dagar ímillum høgan og lágan og uttan at taka hædd fyri, um tað fór at koma honum sjálvum aftur um brekku .

Sakaris var ein tann fyrsti, sum talaði ímóti ampunum frá Havsbrún. Hann var næsti granni hjá virkinum, og tí millum teirra, sum mistu mest bæði í peningaligum virði og í lívskvaliteti av dálk-ingini frá sínum størsta granna.

Men fyri fuglfirðingar flestar stóð Havsbrún sum ímyndin av vælferð, og amparnir av virkinum vóru prísurin, tú mátti gjalda, fyri vælferðina. Tá íð avbygdafólk gramdu seg um ringa roykin í bygdini, svaraðu fuglfirðingar, at tað luktaði av pengum.

Flestu kommunustýrini, íð hava sitið í bygdini, hava eisini havt tað fatan, at trivnaðurin í bygdini er tengdur at, at nóg mikið av arbeiði er at fáa, og tey hava tí lívgað um virkini í bygdini og givið teimum nærum fríar teymar.

Í hesi støðuni hevur tað verið møtumikið at taka amparnar av Havsbrún upp til viðgerar og at mótmæla teimum, tí tá gekst tú ímóti rákinum, og vanligu hugsanini í bygdini, og Sakaris var tí ofta illa sæddur fyri sína atfinningarsomu støðu mótvegis Havsbrún, eisini millum vanliga fuglfirðingin.

Um tað er treiskni og áhaldni hjá Sakarisi, og teimum, sum so við og við løgdust afturat, sum hevur gjørt munin, ella tað eru krøv uttanífrá, er ilt at siga, men nú er eftirlitið við Havsbrún vorðið meira skipað. Tó hugsi eg ikki, at hetta fer at muna, uttan so at vit hava vakið fólk úr bygdini afturat; og tí verður arvurin eftir Sakaris og hansara stríð fyri betri umhvørvi í bygdini, ein tann tyngsta byrðan at lyfta eftir hann.

Ein góður vinur og granni er farin. Harrin styrkið tykkum, sum eftir sita, og uggið tykkum í sorgini.

**Niels**



NØVN Í VIKUNI

Telefon 311820 - Fax 314720 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Harry Hansen 65 ár




Ivaleyst eru tey fleiri, sum kvøkka við, men kortini er tað ein veruleiki. Harry Hansen, sum fleiri ferðir tey seinastu árini hevur runnið maraton teinin, varð 65 ár mánadagin 4. august.

Harry Hovman Hansen er toftamaður. Hann hevur alla sína tíð búð á Toftum, og hann livir og andar fyri øllum tí, sum hevur við Toftir at gera. Harry er yngstur av børnunum hjá Hansinu, sum var ættað úr Elduvík, og Anton Hansen, sum var úr Túni á Toftum. Harry og tey vóru níggju systkin: Karolina, Kirsten, Selmar, Hjørdis, Viggo, Jaspur, Hákun, Adolf og Harry. Selmar, Hjørdis, Jaspur, Hákun og Adolf eru farin foldum frá.

Harry fór, sum flestu dreingir á Toftum fyrrapartin av fimmti árunum, rættuliga ungur til skips. Hann sigldi við línubátum, og hann róði út í Grønlandi. Harry lærdi blikksmíð hjá Bjarna Hansen í Runavík, og seinni var hann í fleiri ár maskinmaður á Nyki. Síðani fyrst í áttati árunum hevur Harry verið skúlatænari í Tofta skúla. Tað er eingin ivi um, at hann gongur við lív og sál upp í sítt arbeiði. Eisini upp í ansingina av svimjihylinum, sum verður leigaður út og sum er opin fyri almenninginum, umframt at hann verður nýttur av skúlanum.

Harry er giftur við Emmu. Hon er dóttur til Nannu og Wensel Olsen, Wensel í Køkinum, á Toftum. Emma og Harry bygdu uppi á Regni, og tey fingu fýra børn: Absalon, sum býr í Havnini, Wensel, sum býr á Toftum, Hansy, sum bara var hálvt ára gomul, tá ið hon doyði í 1970, og Hans, sum býr í Århus.

Harry hevur altíð verið léttur og fimur, og honum hevur dámað væl at íðka allan ítrótt. Men tað var ikki fyrrenn eftir at sonurin Absalon var farin at taka renningina í stórum álvara – hann vann maratonrenningina, tá ið Oyggjaleikirnir vóru í Føroyum í 1989 – at Harry miðvíst fór at venja og renna. Síðani tá hevur hann luttikið í einari rúgvu av rennikappingum.

Emma og Harry hava hildið trúliga saman í mong ár. Har annað er at síggja, sæst hitt eisini. Emma hjálpir Harry at ansa svimjihylinum, og tey eru trúgv í kirkjuni og í missiónshúsinum. Tað kemur meiri enn so fyri, at Harry ber ein vitnisburð fram, bæði í heimbygdini og aðra staðni, har hann vitjar í sambandi við missiónsvikur og onnur høvi.



## Poul Nolsøe Laksáfoss 50 ár

Fríggjadagin 1. august fylti Poul Nolsøe Laksáfoss í Klaksvík 50 ár. Poul Nolsøe er føddur og uppvaksin í Klaksvík, sonur Hallur Laksáfoss úr Klaksvík og Kristinu, f. Nolsøe Olsen, úr Fuglafirði. Kristina doyði í 1974, bert 47 ára gomul. Hallur giftist seinri upp aftur við Elmu f. Hammer.

Poul Nolsøe fór sum 16 ára gamal til skips við Stellu Kristinu og sigldi í nøkur ár, til hann fór í læru í Ídni í Klaksvík. Eftir lokna lærutíð flutti hann til Keypmannahavnar at lesa til maskinmeistara. Í 1977 giftist hann við Jórun Ziskasen, dóttur Arna og Petrinu Ziskasen. Poul Nolsøe og Jórun eiga tveir synir, Boga og Rógva. Í 1979 fluttu tey aftur til Føroya, og Poul Nosøe fór út at sigla sum maskinmeistari við grønlendska rækjutrolaranum Kippokkak, Ternuni og vaktarskipinum Tjaldrið. Í 1983 bleiv hann settur í starv sum meistari við Nørrunu og hevur verið við til dagin í dag.

Poul Nolsøe er álitismaður, fyrikomandi og hjálpsamur. Í frítiðini tekst hann við nógv ítriv, m.a. gongur í fjøllunum, rør kajak og er av størstu KÍ viðhaldsfólkum. Konan og børnini eru tey sum liggja tættast hansara hjarta, og altíð er hann klárur at hjálpa øðrum.

## Mortan Olsen 60

Í dag, mikudagin 6. august, fyllir Mortan Olsen í Klaksvík 60 ár. Mamman, Mona Johannesen, var úr Hvannasundi, dóttir tann tiltikna skiparan Mortan í Hvannasundi. Pápin, Banus (Urbanus) Olsen var klaksvíkingur, sonur Hans Erik Olsen, sum saman við Jógvan Segl hevði fyritøkuna Joensen & Olsen, kallað Seglhúsmenninir. Mona og Banus fingu tríggjar synir. Tann elsti, Hans Erik, doyði fyri nøkrum árum síðani. Mortan er miðlingasonur, og Jógvan er yngstur.

Mortan tók millumskúlaprógv í Klaksvík í 1959. Longu frammanundan hevði hann verið onkran túr til skips, nú gjørdist hann sjómaður og var í Grønlandi og Ný Fundlandi.

Tá hann hevði fingið teir 48 kravdu mánaðirnar í siglingartíð, fór hann 19 ára gamal á sjómansskúla í Havn. Fyrst tók hann stýrimansprógv og í 1965 skipsføraraprógv.

Hann førdi síðani skip hjá Seglhúsmonnunum. Tað vóru fyrst og fremst Hans Erik og hann, sum stóðu fyri fyritøkuni sum fráleið, tí tað eldra ættarliðið var fallið frá. Urbanus doyði í 1984, einans 69 ára gamal, og síðani tá hevur Mortan verið nógv heima.

Í 1997 fór Mortan til Suðurafrika at vera sjómaður og var har í eitt hálvt ár. Ein part av tíðini høvdu teir støð í Port Elizabeth í Suðurafrika, men fyri tað mesta høvdu teir støð á Mauritius og fiskaðu suður móti ísinum.

Seinni fór Mortan við einum vaktarskipi og hevur hildið vakt á norskum øki í Norðsjónum.

Í 1969 giftist Mortan við Elsbu Jacobsen úr Klaksvík, og tey eiga tríggjar døtur og tveir synir.

## Heini O. Heinesen 65



Í dag, mikudagin 6. august, fyllir Heini O. Heinesen, fyrrverandi formaður í Tjóðveldisflokkinum, 65 ár. Heini er kunoyingur, sonur Jensu Mariu Ennistein og Richard Heinesen úr Kunoy.

Í 1960 var Heini útbúgvin húsasmiður, men áðrenn hann fór í læru, hevði hann verið sjómaður í eini tvey ár. Hann arbeiddi sum byggimeistari í 10 ár frá 1967, og var so vegformaður hjá Landsverkfrøðinginum í onnur 10 ár. Tað var í hesum starvi, at Heini gjørdist kendur sum spreingimeistari, tá hann, meðan kunoyingar vóru á fjalli og komnir á rætt, loysti eitt óheppið skot av stutt burturfrá.

Kendastur man Heini tó vera sum politikari. Hann sat í bygdaráðnum í Kunoyar Kommunu, sum umfatar bygdirnar Kunoy og Haraldssund, frá 1962-70 og aftur frá 1977 og hevur verið bygdaráðslimur síðani. Hann hevur eisini verið formaður út í eitt síðani 1977. Sum bygdaráðslimur hevur hann eisini gjørt vart við seg í Føroya Kommunufelag, har hann var í Starvsnevndini frá 1981-85, harav formaður 1983-85.

Í 1984 valdi Tjóðveldisflokkurin í Norðoyggjum hann inn á ting, og hann hevur umboðað flokkin og Norðoyggjar síðani ella í 19 ár. Tað hava serliga verið fiskivinnumál, sum hava havt hansara áhuga, og í nøkur ár var hann formaður í Fiskivinnunevndini, seinni kallað Vinnunevndin. Tað er framvegis fiskidagaskipanin og framum alt trolfriðaðar leiðir, sum hava hansara áhuga, hóast hann nú eisini ger um seg í landsstýrismálanevndini.

## Benny Samuelsen 75 ár



Leygardagin 2. august fylti fyrrverandi blaðstjórin á Dimmalætting, Benny Samuelsen, 75 ár. Benny er fuglfirðingur, sonur Lenu, f. Midjord, og Steingrím Samuelsen, sýðslumann. Hann arbeiddi á Dimmalætting, frá tí at hann sum 14 ára gamal kom í læru sum prentari, til hann legði frá sær fyri aldur 67 ára gamal. Hann kom í leiðsluna á blaðnum í 1971 og gjørdist blaðstjóri í 1981, tá Georg L.Samuelsen legði frá sær fyri aldur. Hann var blaðstjóri á Dimmalætting til 1995.

Benny var nevndarlimur í Húsalánsgrunninum í fleiri ár. Hann hevur spælt nógv sjónleik, verið við í fleiri útvarpsleikum og lisið skald- og stuttsøgur upp í útvarpinum. Hann spælir nógv bridge, og er hann hvørt ár við í haruskjótingini og er ein av okkara mest royndu harumonnum.

Benny giftist við Dúdduni, f. Petersen, úr Kollafirði, tey fingu børnini: Lindu, Andras og Steingrím. Dúddan doyði í 1992. Seinnu árini hevur Benny røkt starvið sum formaður í partafelagnum Dimmalætting.